# Taptu fyri Ísrael

Føroyska U-17 landsliðið í fótbólti tekur í hesum døgum lut í U-17 EM-undankapping.

Kappingin er í Skotlandi, og mánadagin leikti føroyska liðið móti Ísrael. Føroyska liðið tapti dystin 4-2, eftir at Ísrael í steðginum hevði verið á odda 3-0. Beint eftir steðgin økta Ísrael til 4-0, áðrenn Pætur Jørgensen og Kristoffur Jacobsen minkaðu um munin fyri Føroyar.

**-jm**

# Televarpið vísir CL-fótbólt

Champions League kappingin í fótbólti koyrir sum kunnugt við fullari ferð.

Viasat-samtakið, sum ígjøgnum fleiri ár hevur havt rættindini til at senda frá kappingini, sendir afutr í vetur hópin av dystum. Sum nakað nýtt, so verða dystirnir eisini vístir á ViasatSport1 og -2, og tá hetta er á skránni, verða signalini frá sendistøðunum broytt, soleiðis at ViasatSport 2 eisini kann síggjast hjá teimum, sum kunnu taka ímóti rásunum hjá Televarpinum. Tað verður á rásini, sum annars sendir Rás1.

Dystirnir, sum verða á skíggjanum hesa vikuna eru týskvøldið: Real Madrid-Dynamo Kiev (3+), Bayer Leverkusen-AS Roma (ViasatSport 1), Fenerbache-Lyon (ViasatSport 2), Sparta Prag-Manchester United (ViasatSport 2). Mikukvøldið eru dystirnir AC Milan-Barcelona (3+), Valencia-Inter (ViasatSport 1) og Chelsea-CSKA Moskva (ViasatSport 2).

**-jm**

# Tey yngstu svumu í Fuglafirði

**120 svimjarar úr øllum landinum tóku lut, tá Fuglafjarðar svimjifelag um vikuskiftið skipaði fyri svimjikapping**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Hesa ferð vóru tað bólkar 1 og 2 (t.e. 6 til 10 ár), sum kappaðust. Í alt vóru 22 kappingar avgreiddar, og hesaferð gjørdist tað svimjifelagið, Reki, sum streyk avstað við flestu sigrunum.

Næsta kappingin verður um hálva aðru viku, og verður hendan í Havn.



*Fremstu svimjararnir skuldu sum vera man hava heiðursmerki*

Endaliga heiðursmerkjabýtið í kappingini gjørdist hetta:

| | G. | S. | B. |
|---|---|---|---|
| Reki | 9 | 3 | 6 |
| F.fj. Svimjif. | 4 | 8 | 6 |
| Flot | 3 | 4 | 2 |
| Ægir | 3 | 2 | 0 |
| Vágs Svimjif. | 2 | 3 | 1 |
| Ha. Svimjif. | 1 | 1 | 4 |
| Skeggjar | 0 | 1 | 1 |
| Tvør. Svimjif. | 0 | 0 | 0 |

# Skjóta nú í Vágum

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Týskvøldið í farnu viku varð stovnandi aðalfundur fyri nýggjum bogaskjótifelag hildin í skúlanum á Giljanesi.

Seinastu tveir mánaðirnar hevur verið arbeitt við at seta á stovn bogaskótifelag í Vágum. Stigtakari er Øssur Hansen úr Vestmanna, sum hevur savnað nakrar nýggjar bogaskjúttar, sum vóru sinnaðir at stovna felagið.



*Øssur Hansen úr Vestmanna er formaður í nýggja bogaskjótifelagnum*

Á fundinum varð fyrsta nevndin vald og teir sum manna nevndina eru Øssur Hansen úr Vestmanna, Tróndur Ravnsfjall og Ingi Joensen úr Miðvági. Tiltakslimir eru Jákup Gardar Joensen úr Sandavági og Tórfinn Hansen úr Miðvági. Nevndin skipar seg í næstum.

Felagið, sum hevur heimstað í Miðvági, hevur ikki fingið navn enn. Endamálið hjá felagnum er at íðka bogaskjóting og verða við til at menna hesa ítróttargrein.

# Duathlon kapping í Havn

**Sunnudagin skipaði Føroya Triathlon felag fyri sokallaðari duathlon-kapping. Hetta er kapping, har tvær ítróttargreinar verða íðkaðar**

DUATHLON
*tíðindaskriv*

Hesaferð var so kappast í súkkling og renning. Súkklað var av Oggjarvegnum, áraka Kleynisvarða og oman til Krákugjógv t.e. við hjá Meinhart Arge.

Síðani bleiv runnið niðanaftur. Teinurin var 3,1 km, og var súkkluferðin hjá onkrum súkklara um 85 km/t.

Tá súkklað verður við so nógvari ferð, er av alstórum týdningi, at súkklarin lítir á, at ikki óviðkomandi bilar o.a. kemur inn á kappingarteinin.

Til hetta fekk FTF so hjálp frá politinum, umframt at felagið sjálvt hevði sett vaktir at ansa startmálinum og staðnum, har skift varð.



*Dia Jacobsen úr Havn, sum annars er best kendur frá svimjingini, vann duathlon-kappingina, sum hesaferð fevndi um súkkling og renning*

Tveir íðkarar høvdu fjallasúkklu í staðin fyri rasarasúkklu, og fingu teir góðskrivað 30 sek, tí fjallasúkklurnar rulla seinni undan brekkuni. Munurin vísti seg tó ikki at vera so stórur, sum roknað varð við, og tí er avgerð nú tikin um, at næstu ferð verður góðskrivingin av hesum bara 15 sekund.

Tað gjørdist Dia Jacobsen, sum vann kappingina. Endaliga úrslitið varð annars hetta:

| | |
|---|---|
| Dia Jacobsen | 17.59,28 |
| Eli Christiansen | 18.28,05 |
| Evald Rasmussen | 19.59,33 |
| Kári Simonsen | 20.50,91 |
| Rob. Vilhelmsen | 21.59,09 |

Komandi sunnudag kl 1300 verður so seinasta kappingin hjá Triathlonfelagnum í ár, og er kappingin eisini dysturin um FM-heitið á 1/8 triathlon teininum. Hetta er 750 m svimjing, 20 km súkkling og 5 km renning.

Saman við triathloníðkarunum verður eisini The Dream Team frá Ljósinum. Hetta eru kvinnur, sum hetta fimleikaárið stuttleika sær við at royna nógv sløg av ítrótti, sum ikki altíð hava nakað við fimleik at gera.

Tær fara a royna seg á 1/12 triathlonteininum, sum verður lagaður soleiðis:

Fyrst verður svomið 350 m í Svimjihøllini, síðani súkklað 10 km eftir Norðara Ringvegi, Fram við Strond til Skansan tvær ferðir, og so til seinast skifta til renning við Skógrøkt Landsins, og runnið verður tríggjar ferðir eftir Hvítanesvegnum, Skraddaragøtu og gøtunum hjá Skógrøktini, til málið við høvuðsportrið hjá Skógrøktini.

# Juanna móti endaspælinum

Kappingin í grundspælinum í donsku elitudeildini er nú komin nærum hálvan veg. Ein leikarunum í kvinnudeildini er føroyska Juanna S. Joensen, sum spælir fyri SK Århus, og hjá teimum hevur gingið hampuliga væl.

Seks tey fremstu liðini í grundspælinum sleppa við í endaspælið, og fram til nú eru Juanna og tær á einum fjórða plássi, so málsetningurin hjá felagnum um at vera við í endaspælinum, tykist als ikki veruleikafjarður.

Juanna hevur tó ikki tikið lut í øllum dystunum higartil í ár. Okkurt skifti hevur hon verið uttanlands, men nú er hon so aftur á liðnum, og tað fer at líkjast einum føstum plássi hjá henni. Hon var tó ikki millum tær fyrstu á vøllinum, tá grannauppgerð móti ASV Århus var á skránni um vikuskiftið, men hon kom á vøllin í øllum settunum, og serliga í tí fyrsta gjørdi hon um seg, tá hon servaði liðið frá 19-20 til 24-20. Millum annað takkað verið tveimum reinum essum frá Juannu.

Endaliga úrslitið gjørdist ein 3-1 sigur til SK.

**-jm**

# Vunnu 4-0 á San Marino

Føroyska talvlandsliðið fekk reint borð, tá telvað varð móti San Marino mánadagin.

Martin Poulsen, Hans Kristian Simonsen, Olaf Berg og John Rødgaard mannaðu borðini hjá føroyska liðnum. San Marino hevði undan dystinum væl lægri ratingtøl enn føroyska liðið, og tíbetur megnaðu okkara eisini at liva upp til favoritt-heitið.

Sigurin ber við sær, at Føroyar nú hava 8 av 16 møguligum stigum.

**-jm**



# Bjarni vann Haldor Holm Cup



*Ein fegin vinnari av Haldor Holm Cup, Bjarni Skaalum*



*Bjarni vann men tað var tepurt, bert fýra eygu vóru til Krisjan Suna*

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Ein av teimum bestu og yngstu spælarunum í føroyskum billardspæli, Bjarni Skaalum úr Kagganum, kundi leygardagin fyri fyrstu ferð í síni 8 ára karrieru taka ímóti einum stórum vinnarasteypi í eini staklingakapping. –Hetta er eitt tann besta løtan í lívinum segði tann ungi billardspælarin úr Havn, tá hann leygadagin í Klaksvíkar Klubba syfti billardkempuna úr Klaksvík, Krisjan Suna Høgnesen, sum hesi seinastu árini hevur vunnið eina kapping fyri og aðra eftir, bæði FM fyri staklingar og Haldor Holm Cup.

Hesaferð var tað Bjarni, sum hevði eydnuna við sær umframt tað besta spælið sjálvandi. Men munurin var lítil, tá avtornaði. Bjarni vann við 4 eygum í eini kapping við fýra dystum, har hann endaði við einum úrsliti uppá 2164 eygu ella 27,05 í meðal. Eitt framúr gott úrslit og ein varði í billardspælinum hjá tí unga Kaggaspælaranum. Hann hevur tó verið sera frammaliga í kappingum og hevur vunnið lið-FM fyri sítt felag.

Spenningur var til tað allar seinasta stoytið, tá Bjarni hevði eitt rættiliga svart upplegg, men hóast nervarnir vóru á "højkant", so megnaði hann at spæla ein sera torføran reyðan bólt, sum gav honum sigurin. Haldor Holm Cup er sjálv byrjanin uppá billardárið, og tá møtast teir 6 bestu spælararnir frá undanfarna kappingarári. Tann, sum fær flest eygu í fýra dystum, er vinnari.

Nr. 2 gjørdist Krisjan Sune Høgnesen. Hann hevði eisini sera høgt meðaltal, 27.00. Nr. 3 gjørdist Ólavur Kjølbro við 20,68 eygum í meðal, nr. 4 varð Sonhard Johannesen við 20.38 eygum og nr. 5 Jan Müller við 19.28 eygum í meðal. Jan hevði hægsta einstaka umfarið í kappingini uppá 166 eygu. Besta einstaka spælið átti Bjarni Skaalum við 704 eygum.

Verandi føroyameistari, Henrik Petersen skuldi eisini vera við men hann gav avboð. Eisini onnur avboð vóru til kappingina.

Kappast hevur verið um Haldor Holm steypið síðani 1989. Hvørja ferð hevur Føroya Bjór verið sponsor og hevur latið steyp til kappingina.



*Teir tríggir bestu í Haldor Holm Cup í ár. Bjarni í miðjuni nr. 1, Krisjan Sune tv. Nr. 2 og Ólavur Kjølbro th. Nr. 3*